# Stórskíggi í Atrium á Glasi útboð 2019

## Innihaldsyvirlit


1) Inngangur ..... 2
2) Kravfesting ..... 2
3) Støðulýsing av atrium ..... 3
4) Dømi - uppsetan av mobilum skermi í atrium ..... 4
5) Montering ..... 4
6) Vitja okkum ..... 5
7) Samanumtikið ..... 5
    7.1) Stórskíggi ..... 5
    7.2) Montering ..... 5
8) Spurningar og treytir ..... 5

## 1) Inngangur

Á Glasi ynskja vit at fáa ein stórskíggja ið dekkar tørvin hjá okkum í atrium. Á hesum staðnum kunnu 100-tals fólk savnast, og tískil er tað týdningarmikið at skermurin sæst væl, bæði tá ið tú ert nær, og langt burtur frá skerminum.

## 2) Kravfesting

Vit ynskja ein skíggja ið er millum **5 til 6,5 metrar** í breidd.

Skermurin skal lúka hesi minstu krøv:

- Aspect ratio: **16:9 (1,78:1)**
- Pixel pitch: **hægst 1,27 mm**
- Loysnin skal kunna vísa minst eina HDMI keldu.
- 3-ára garanti




*Mynd 1 - skíggja kravfesting*

# 3) Støðulýsing av atrium



*Mynd 2 - Lýsing av ynsktu loysnini í atrium*

**Mynd 2** lýsir loysnina ið vit hugsa at fáa á Glasi. Skermurin er settur soleiðis at flestu áskoðararnir síggja skermin. Hetta merkir at høgra síða er eitt sindur frammanfyri, soleiðis skermurin stendur skráur ímóti fjøldini.



*Mynd 3 - Hvussu vit ímynda okkum monteringina*

Vit ímynda okkum at skermurin hangur úr loftinum og  ikki tarnar rýmingarleiðum. Á **mynd 3** omanfyri sæst hvussu vit ímynda okkum monteringina. Her ynskja vit at veitarin kemur við einari nøktandi monteringsloysn, ið er snøgg og haldgóð.



*Mynd 4 – Lýsing av ynsktu loysnini í atrium við útsýni frá 4. hædd.*

## 4) Dømi - uppsetan av mobilum skermi í atrium







Á hesum myndunum sæst ein mobilur 4,5 metrar breiður skermur í atrium.

Tað er ikki hendan loysnin ið vit ynskja, men hesar myndirnar eru viðlagdar fyri at geva eina veruliga hóming av hvussu ein stórskíggi tekur seg í atrium.

## 5) Montering

Tað verður sæð jaligt um veitarin hevur møguleika at veita montering av stórskíggjanum. Vit ynskja í hvussu er at ein monteringsloysn verður bjóða, við ella uttan arbeiðsmegi.

# 6) Vitja okkum

Vit síggja tað sum ein fyrimun um veitarin kemur á vitjan, fyri at síggja atrium, og til eitt prát um møguligar loysnir, áðrenn tilboð verður givið.

# 7) Samanumtikið

Vit ynskja fylgjandi tilboð:

## 7.1) Stórskíggi

- 5-6,5 metrar í breidd
- Aspect ratio: **16:9 (1,78:1)**
- Pixel pitch: **hægst 1,27 mm**
- Loysnin skal kunna vísa minst eina HDMI keldu.
- 3-ára garanti

## 7.2) Montering

- Tilfar og loysn til at monterað stórskíggjan í loftið (ella uppskot um aðra monteringsloysn)
- Handverkarar at monterað skermin (Valmøguleiki)

# 8) Spurningar og treytir

Spurningar skulu vera skriftligir og skulu setast Áka Heinesen Højsted við telduposti til ahh@glasir.fo

Freistin at seta spurningar er **11. desember 2019 kl. 12.00**. Svar vera almannakunngjørd á keypsportalinum, so skjótt tey vera svara.

Freistin at lata inn tilboð er **12. desember 2019 kl. 12.00,** og verður fari undir samráðingar so skjótt sum møguligt. Vinnarin verður almannakunngjørdur í seinasta lagi tann **17. desember 2019**.

Glasir tilskilar sær rættin ikki at taka av nøkrum tilboðið, um mett verður at einki er nøktandi.

Øll tilboð, við tilfari, skulu sendast til ahh@glasir.fo í PDF formati, og prísurin skal vera íroknað frakt, toll, og útbering til Glasir.